# Skemt

## Nógvir líkjast Akseli




Fyri kortum høvdu vit eina mynd frá sending hjá Kringvarpinum, har okkara egni blaðmaður Uni Holm Johannesen varð presenteraður sum Aksel V. Johannesen. Og nú er aftur galið. Nú er tað Tróndur Enni, sum líkist landsstýrismanninum so nógv, at Dagur og Vika blandar teir. Jú, teir eru sanniliga fleiri sum líkjast Akseli.




## Hvar er skeltið?

Portalurin bar í vikuni tey tíðindini, at tey ungu í Ísrael fara til høgru. Á myndini, sum varð sett saman við tíðindunum, síggja vit einki forboðsskelti ímóti at fara til vinstru.

## Mannfólk verða klipt í neðra

Okkara grannar í Vágsbotni, Harraklipping á Bryggjubakka, hava nú víðkað um virksemið. Tær hava eisini leigað ovaru hæddina í bygninginum, har tey skulu klippa konufólki. Spurningurin er so, um tað verður sagt, at kvinnurnar verða kliptar í erva – og menninir í neðra.



## Tað hjálpir lítið

Tað verður stundum ført fram, at tað eru ov fáar kvinnur í løgtinginum. Bæði kvinnur og nógvir menn eru samd í, at kvinnurnar áttu at verið umboðaðar í okkara parlamenti. Nú skrivar Vágaportalurin: “Lundin í løgtingið”. Vit halda ikki, at tað fer at hjálpa nakað serligt upp á javnstøðuna – men í minsta lagi verður so kanska nakrir færri menn í løgtinginum.

## Í RANGASTRÚPAN

**Stongd leið!**
Toskur av Føroyabanka í Áarstovu
*Portal.fo*

**Landskassin leingi livi, hurrá, hurrá, hurrá!**
Landskassin 429 mió. kr. í halli næsta ár
*Kringvarp.fo*

**Hvat merkir tað?**
Munnligt føroyskt krav um landgrunn lagt fyri ST
*Dimma.fo*

**Ruddið forsíðuna**
Føroyingar í Esbjerg
*Portal.fo*

**Tað gera vit eisini!**
Høgni Hoydal: Vit eygleiða sjónleikin í samgonguni
*Kringvarp.fo*

**Borgarlig ella vinstravend?**
Nýggj samgonga í Arktis
*Dimma.fo*

**Nýggjur landsstýrismaður?**
ohan Dahl, landssýrismaður, ætlar nú at yvirtaka málsøkið um loðsar umborð á skipum, sum sigla imillum oyggjarnar í Føroyum og inn í havnir og út aftur.
*Portal.fo*

**Yo Paulus, what's up?**
Nýggja Testamenti við einum »fresh look«
*Dimma.fo*

**Skál fyri tí!**
TAKS skal kanna náttarlívið
*Dimma.fo*

**Hvat verður tað næsta?**
Fútin selir fisk
*Portal.fo*

**Hvønn?**
Teir hava tikið hann út um fyri fyrst
*Merkistein í fótbóltsfrásøgn*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Jävla alt

»Jävla« og so kom navnið á einum flogfelagi, sum mær heldur ikki dámar so øgiliga væl.

Ungi maðurin tveitti tasku og frakka í eina sofu og fór at reika, veipandi og bannandi, sjónliga í øðini. Hin, teir vóru tveir, var sinniligur og royndi at sissa tann kókandi mannin. Men tað nyttaði einki. Maðurin var illur. Og so rýmdi hann í somu øði oman eftir longu gongini í fráfaringarhøll fimm. Uttan iva fyri at finna onkran innan fyri eina skivu, hann kundi skelda um hatta forbannaða flogfelagið, nú hann var afturúrflogin.

Tí teir vóru komnir ov seint til flogfarið, teir skuldu við. Flogfarið, teir komu við, var seinkað.

Ungu menninir vóru í yvirmannabúna hjá svenska herflotanum. Kanska skuldu teir í kríggj í Libia. Tað er so langt síðani, at Svøríki var í kríggi, at ikki ber til at vera ov seinur, nú framkomni svenski ídnaðurin aftur skuldi roynast í verki.

Var tann óði bardagamaðurin um borð á skipi sínum, løddi hann kanónina og skeyt hatta forbannaða, jävla, flogfelagið niður.

Hetta var so enn av nógvum eygleiðingum í keðiligari fráfaringarhøll. Eg vildi so gjarna, at flogfarið, eg kom við, var seinkað, tí so var ævinleikin at bíða styttri.

At bíða í floghavnum er øgiliga konsentrerað einsemi. Hetta var so í Arlanda í Stokkhólmi, keðiligasta bíðiplássi, eg veit um, at eg sá teir báðar svensku admirallærlingarnar, har sum annar leyp á, áðrenn hann var komin á vígvøllin.

Eg noyddist at bíða leingi hesa ferð í Arlandi. So er ikki annað at gera enn at drekka øl (heimsins dýrasta) og hyggja eftir hinum kyninum.

Tú kennir einsemið síga nívandi sum setandi flogfør oman yvir teg. Øll ræðast einsemið verri enn dómadag og Guds øði. Tí hava øll farteldu og hesar nýggju telefonirnar, sum eg ikki veit, hvussu eita, og eg vil heldur ikki vita tað. Eg minnist, tá postfax var stóra samskiftisopinberingin, tann størsta síðani tíggju boðini. So kom telefaxið á eitraðum pappírsrullum, har ringt var at lesa boðini, tí skriftirnar vóru so kámar og toldu ikki sveittandi fingrar. Og so gamal eri eg heldur ikki, takk. Hetta eru hóast alt bara góð 20 ár síðani.

Fólk so bangin fyri einseminum, at tey tora ikki at tosa við fólk av ótta fyri, at tey ikki svara. Tey tosa bara við telduna og telduhvølpin. Tey svara sum oftast.

Eg havi ongan sæð lýst so væl einsemið sum Fassbinder í meistaraverkinum um Petru von Kant. Einsemi og hjartasorg í senn. Skarpari lútur finst ikki. Hjartasorg er verri enn onnur sorg, tí tann farna/i er á lívi.

Nú eitt kvøldið, eg sat á mínari yndis vjetnamesisku matstovu á Vesterbro, sótu fýra ung fólk við næsta borð, tríggjar kvinnur og ein maður. Tann eina kvinna hevði hjartasorg. Hini royndu at ugga hana. Serliga maðurin helt seg vera framúr dyggan í ráðum. Og hann var so harðmæltur, at øll, sum høvdu hjartasorg í Colbjørnsensgade og niðaru Istedgade tað kvøldið, kundu lurta. Ikki tí har var so nógvur veruligur uggi. Vanliga orðaskvaldrið um, at lívið heldur fram, og hon var ikki nakað fyri teg kortini og annars vanliga orðaskvaldrið, sum einki nyttar.

Hoyrdi um ein, sum var so syndarliga einsamallur, at hann fór í bilin, tendraði GPSaran og koyrdi so – skeivt. Tað gjørdi hann við vilja fyri at fáa GPSina at tosa við seg.

Fólk tora ikki bara at vera saman við sær sjálvum. Løgið, tá so nógv eru við at kvalast í berari sjálvgleði.

Illi flotamaðurin kom aftur við tveimum boardingkortum, so teir sluppu, nakað seinkaðir, í kríggj.